## Hummari fyri 590 kr. fyri kilo

Vei›an hjá norskum hummarafiskimonnum í byrjanini av verti›ini í heyst hevur sum heild veri› munandi lakari enn í fjør.

Ann-Lisbeth Agnalt, sum granskar hummara, er vi› í eini nevnd, sum endursko›ar reglurnar fyri vei›i.

Hon sigur, at nevndin fer at seta bann fyri vei›i av hummara, sum ber rogn, og somulei›is ver›ur loyvda longdarmáti› sett upp í 25 cm.

Norsk blø› skriva annars um gó›ar prísir fyri hummara.

Ein prís-kanning vísti herfyri, at d‡rasti hummarin á markna›inum í Noregi fór fyri heilar 590 norskar krónur fyri kg.

**-vilmund.**

## Verja laksin í Eystursjónum

Røddir eru frammi í Svøríki um at steðga allari laksaveiði í Eystursjónum í fimm ár. Við hesum vóna sviar, at laksastovnurin í áunum fer at mennast aftur.

90% av øllum laksi í Svøríki finst nevniliga í áunum í Nordland.

Londini við Eystursjógvin hava eisini gjørt av, at øll garnaveiða eftir laksi skal halda uppat í 2008.

Skip, sum hava livað av hesi veiði, kunnu søkja um upphøggingarstuðul, tá ið eingin garnaveiða verður meira.

**-vilmund.**

# Visjón fyri “Gransking, menning og

KRONIKK
*Flóvin Eidesgaard*

Á visjónstorgi á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn 30. oktober 2006 var framløga av visjón 2015. Her er eitt íkast til kjakið um granskingarvisjónina og -strategiina. Fyrri partur av kronik í tveimum pørtum.

Eg skal í tveimum kronikkum gera viðmerkingar til granskingarstrategiina hjá Landsstýrinum í visjón 2015. Í fyrra parti verður verandi upplegg hjá arbeiðsbólkinum viðgjørt saman við tí búskaparligu hugsan, sum liggur aftanfyri. Nógv verður gjørt burtur úr at analysera, hvørjar avleiðingar kunnu væntast av tí strategi, sum er løgd fram, tí at døma eftir fyrstu svarunum uppá nakrar av atfinningunum niðan fyri er tað neyðugt. Í seinna parti verður úrtøka av gransking viðgjørd, og hvussu hon kann økjast. Á hesum grundarlag verður ein skitsa fyri eina granskingarstrategi gjørd, og herundir verða nøkur óvæntað granskingarøki nevnd, ið kunnu geva góða úrtøku til føroyska samfelagið.

Uppleggið til granskingarstrategi inniheldur fleiri góð hugskot, og viðgerðin í arbeiðsbólkinum higartil er sjálvsagt heldur ikki burturspilt, men yvirordnaða hugsanin, tankagóðsið, er eftir mínum tykki á heilt skeivari leið og er ávirkað av grundleggjandi misskiljingum av vinnupolitikki og búskaparfrøði, og manglar eina analysu av, hvørjir trupulleikar gera, at so lítið verður granskað í dag. Tá fundamentið er soleiðis, er stórur vandi fyri, at man ger álvarslig mistøk.

### Um gransking í visjónsætlanini

Visjónin, at “Føroyar eru millum heimsins fremstu lond innan gransking, menning og nýskapan” er góð, tí hon gevur nakað at miðja ímóti, og ikki er ósannlíkt, at Føroyar á nøkrum granskingarøkjum kunnu verða fremst. Men beint eftir hetta stendur skrivað, at “Hesi viðurskifti skulu samskipast soleiðis, at tað almenna og vinna ganga hond í hond innan samskipan og raðfesting”. Her er tað, vandin lúrir.

Granskingarstrategiin er sambært upplegginum í trimum høvuðsøkjum, Bygnaður, Raðfest øki og Fígging og úrtøka. Fígging og úrtøka kemur við í seinna part, tey bæði fyrru punktini verða viðgjørd í hesum parti.

Skipast skal ein bygnaður, sum samskipar alla almenna og privata gransking. Bygnaðurin skal “skapa eitt kveikjandi granskingarumhvørvi, merkt av skapanarevnum, liðiligleika og villskapi.” Hetta eru góð mál, men her liggur eitt paradoks, sum framgongur niðanfyri.

Endamálið við at skipa alla gransking í ein bygnað er at kunna stýra granskingini móti ávísum satsingarøkjum, “soleiðis at vit við tíðini fáa fleiri bein at standa á”, og eftir úttalilsum at døma, eisini at fáa nakrar skala-effektir. Bæði hesi endamál eru óheppin.

Føroyar eru so lítlar, at á granskingarøkinum kunnu Føroyar ongantíð vinna í altjóða kapping uppá skala-effektir. Føroyar kunnu vera við í bæði samstarvi og kapping á fleiri økjum, men skulu vit hava nakran møguleika at vinna í altjóða kapping, so má tað vera í gransking har skala-effektir ikki hava týdning.

Høvuðsatfinningin ímóti granskingarætlanini er tó, at man frá almennari síðu vil ávirka, hvat vinnan skal granska í! Tað verður gjørt uppá ein máta, sum er ein leið beint aftur í 80ini.

Tað stendur ikki beinleiðis, men kom fram bæði í framløguni av upplegginum til granskingarstrategi og politiskum úttalilsum í kjakinum aftaná og serliga í sendingini “62 norður” dagin eftir, at ætlanin er, at tað almenna skal gera gransking, sum hoyrir vinnuni til, og tá tað almenna fíggjar, skal eitt vísindaráð “sum er forankrað við leiðandi politikarum, sum saman við fakfólki siga, hvørji eru satsingsøkini.” (Løgmaður í “62 norður”.)



**FAKTA**

**Flóvin Eidesgaard** er B.S. í matematik-økonomi, serliga innan privatisering og vinnuregulering. Hevur arbeitt fyri m.a. COWI-consult, Hagstovuna, Javnaðarflokkin, Pisa-kanningina og Social-forskningsinstituttet, og hildið fyrilestrar um Føroyar á Nordisk Journalistcenter á Danmarks Journalisthøjskole. Formaður í granskingar- og útbúgvingarnevndini hjá MFS í 1998 og 1999.

### Tað sama sum í 80unum

Í 80unum var ein skipan, har tað almenna veðhelt fyri skip, men bara um tað vóru tey røttu skipini. Menn sum vildu seta pening í skip gloymdu at spyrja, hvørji skip kundu bera seg, teir spurdu í staðin, hvat man kundi fáa veðhald til. Soleiðis satsaðu teir privatu skeivt fyri 2.6 milliardir, tí tað almenna vildi tað. (Caragata: Veðhaldsútgjald 1992-93.)

Tá eg geri hesa samanbering, so er tað ikki ein roynd at rópa fyri at fáa fólk at lurta. Tað er tí, at mekanismurnar man setur í verk, eru neyvt tær somu. Man ger sama mistak, men uppá ein eitt sindur øðrvísi máta. Og í mun til í 80unum, ætlar man hesa ferð at rinda so hvørt.

Raðfesting er nakað sum fer fram dagliga í øllum liðum, og skal eisini vera. Men at prioritera vinnugransking kann einans vinnan gera. Tað er vinnan, sum hevur fingurin á pulsinum, og við luttøku á marknaðinum hevur møguleika at vita, hvat ber til, og hvat ikki ber til.

Samstundis sum vit eru í gongd við at privatisera almennar fyritøkur, fyri at tær betur skulu kunnu virka á marknaðinum í kapping við aðrar fyritøkur, so ætlar man nú at nationalisera føroyska vinnugransking. Tann sum rindar fyri granskingina hevur natúrliga ognarrættin til úrslitini. Er ætlanin, at tað almenna skal granska og geva úrslitini burtur? Og skulu úrslit av eini verkætlan gevast til ávísa fyritøku ella til allar? Hvat við patentum? Einfaldu spurningarnir vísa, at ætlanin ikki er heilt gjøgnumhugsað, og stórir óloystir spurningar.

Tað er enn ikki heilt greitt út í æsir, hvussu bygnaðurin skal skipast, men ein slíkur bygnaður verður tungur og seinførur. Vit fáa eina sera stirvna skipan, fyrst politiska telving og uppíblanding (sambært endurgeving frá Løgmanni í “62 norður” omanfyri), aftaná skal landsgrannskoðarin kanna, hvussu pengarnir eru brúktir (soleiðis er sambært lóg), og hetta verður vinnan noydd at tillaga seg. Tað er ein ófrávíkiligur veruleiki, at vinnan kann ikki samstundis tillaga seg marknaðin. Tað er ikki ein spurningur um, hvørjir politikarar sita og velja satsingsøki. Almenn raðfesting verður oftari skeiv enn rætt, tí hon verður ikki tillagað marknaðin.

Í einum globaliseraðum heimi, sum visjónsætlanin fyrst og fremst skal brynja Føroyar til, og har broytingar kunnu henda bráddliga og skjótt, er ein strategi, har man sentralt velur, hvat satsast skal uppá, serliga vandamikil. At skipað alla føroyska gransking í ein bygnað er tí ikki ein strategi, ið hoyrir framtíðini til.

### Granskingarstuðul kann forða nýhugsan

Tað er eingin munur á at stuðla ávísum útvaldum vinnuíløgum og at stuðla ávísari útvaldari vinnugransking. Bæði avlaga vinnusamansetingina soleiðis, at vit fáa aðra vinnu enn hana, sum ber seg best á marknaðinum, og sum ger landið ríkast. Á henda hátt er eingin munur á rakstrarstuðli, íløgustuðli og granskingarstuðli til vinnu.

Henda avleiðing fer at síggjast soleiðis, at tá tað almenna fer við pengum inn í ávísa vinnugransking, so fara privatu pengarnir aftaná, tí privata úrtøkan er størri, har almennur stuðul fæst. Tað merkir, at man ikki bara økir innsatsin á valdu satsingarøkjunum, sum í dag ikki bera seg, man vil samstundis draga privatar pengar burtur frá aðrari gransking, sum íleggjarar annars høvdu vónir til kundi geva positiva úrtøku. Hesa avleiðing hevur man yvirsæð, um man heldur, at almennur stuðul vil geva betri vinnugransking.

Men trupulleikarnir enda ikki her. Tá tað almenna ætlar at fíggja vinnugransking, har úrtøkan skal koma sum privat gagnnýtsla, stovnar man ein nýggjan vinnupolitiskan marknað til kradding. Politiska raðfestingin fer at koma undir trýst frá privatum búskaparáhugamálum. Sterkast á vinnupolitiska marknaðinum er sum oftast verandi vinnulív. Vegna kradding fáa vit tí orsøk at stúra fyri, at granskingarbygnaðurin fer at gerast júst ein forðing fyri nýhugsan innan menning og nýskapan, í staðin fyri ein drívmegi.

Tað gevur einans meining, at tað almenna blandar seg í vinnugranskingina, um man heldur, at politikarar og byrokratar vita betur, hvat fer at geva úrtøku, enn vinnulívsfólk og íleggjarar. Og sjálvt politikarar við stórum sjálvsáliti eiga at duga at síggja, at tað er ein fortreyt, sum ikki er uppfylt í dag.

Tað verður helst granskað minni í vinnuni í dag enn tað, sum hevði givið mest úrtøku fyri samfelagið. Men orsøkin er, at vinnugransking gevur ov lítla privata úrtøku. Og tað er lætt at finna eina orsøk!

Vit hava í nógv ár havt stóran stuðul til fiskivinnuna, m.a. ókeypis fiskidagar, og harvið kappast aðrar vinnur ikki á jøvnum føti um kapitalin. Í staðin

| Gransking, menning og nýskapan sum % av BTU | | | |
|---|---|---|---|
| | Alment | Privat | Ialt |
| Føroyar | 0,6 | 0,2 | 0,8 |
| Noreg | 0,8 | 1,0 | 1,8 |
| USA | 0,8 | 1,9 | 2,7 |
| Danmark | 0,8 | 1,9 | 2,7 |
| Finnland | 0,9 | 2,4 | 3,3 |
| Svøríki | 1,0 | 3,2 | 4,2 |

Kelda: Búskaparráðið 2005